Føroya Fuglafrøðifelag

**Veingjasuð** Árgangur 5, nr. 3 – oktober 2014



**Mynd 1:** Láturkópur
(Mynd: Hans Eli Sivertsen)

# Nasamottur í láturkópi

Skrivað hevur: **Jens-Kjeld Jensen**

Mottur eru smá djór, ið sjáldan eru meir enn fáar millimetrar til longdar. Tær hoyra til flokkin Spunarar, Arachnida. Mottur eru vanligar í náttúruni, t.d. í mold, har tær hava stóran týdning sum niðurbrótarar av lívrunnum tilfari, tí eru tær ein týðandi liður í vistskipanini. Fleiri mottusløg liva sum sníkar á øðrum djórum og plantum. T.d. er lundalúsin (Ixodes uriae) ein motta.

18. november í 2000 fann Jens-Kjeld Jensen 41 mottur í andaleiðini á einum láturkópi (Halichoerus grypus (Fabricius 1791)) í Lamba. Hesar motturnar hava ikki føroyskt navn, men á latíni kallast tær Halarachne halichoeri (G. Allman, 1847) , og tað var fyrstu ferð, at tær eru skrásettar í Føroyum. Hetta slagið er tó vanligt í Norðuratlanshavi og suður til Spania.

Nasamottur eru mottur, ið liva sum snúltarar í andaleiðini á súgdýrum. Halarachne halichoeri livir av blóði frá vertinum, og kvennmottan leggur livandi ungar. Ungarnir fara ígjøgnum nøkur menningarstig, áðrenn teir verða vaksnir. Vaksnar mottur hava eins og allir aðrir spunarar átta bein, men á teimum fyrstu menningarstigunum hava máttuungarnir vanligvís seks bein ella færri. Fleiri av ungu mottunum, Jens-Kjeld fann, høvdu seks bein.




**Mynd 2:** Halarachne halichoeri
(Mynd: Una Matras)

Nasamotturnar eru til stóran ampa hjá kópinum. Gransking gjørd í 2012 vísti, at ungir kópar, sum hava nasamottur í andaleiðini, eisini eru í størri vanda fyri at fáa ígerðarsjúkur og hjáholubruna. Óvíst er, hvussu nógvir kópar um okkara leiðir eru plágaðir av nasamottum.

Heimasíðan hjá Føroya Fuglafrøðifelag er:
**www.faroenature.net/ffff**

BirdLife International AFFILIATE